# Klaksvíkar býur ruddast og snøggast



*Klaksvíkin er vøkur, og nú kommunan av álvara er farin undir at snøgga, frýðka og rudda, verður Klaksvíkin uppaftur vakrari. – Tá ið Norðoyatunnilin letur upp, verður Klaksvíkar býur "reinur og fríður", sigur borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**– Um alla kommununa verður arbeitt við at snøgga og fríðka, og tá ið Norðoyatunnilin letur upp, verður býurin reinur og nossligur, sigur borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Klaksvík hendir nógv í hesum døgum, nú tíðin til Norðoyatunnilin letur upp, rættiliga er farin at styttast.

Leygardagin, 29. apríl, verður latið upp fyri størsta frambrotinum í føroyska samferðslukervinum, og tá verður koyrandi heilt úr Gásadali í Vágum norður til Viðareiðis á Viðoynni.

**Gestsins eyga**

Borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen, sigur, at tey arbeiða rættiliga hart um dagarnar við at fríðka um býin.

– Vit arbeiða víða um við at snøgga og fríðka, og tá ið Norðoyatunnilin letur upp, verður býurin reinur og nossligur.

Hann vísir á orðafellið, at "gløgt er gestsins eyga", og tí leggur kommunan stóran dent á, at býurin er reinur, ruddiligur og nossligur, tá ið tunnilin letur upp, og fólk fara at stevna norður um Leirvíksfjørð – undir havbotninum.

– Kavin, sum lá nakrar dagar herfyri, tarnaði okkum í hesum arbeiði, men nú er tátt aftur, og fríðkingararbeiðið er í gongd aftur.

**Ruddingardagar**

Borgarstjórin veit at siga, at kommunan fer at skipa fyri tveimum ruddingardøgum í næstum. Hvørjir hesir dagar verða, fer kommunan ætlandi at taka støðu til í morgin.

– Vit fara at skipa fyri tveimum ruddingardøgum – einum degi, har vit fara at eggja vinnuni til at taka upp rundan um virkir og bygningar og einum degi, har privatfólkum verður eggjað at taka upp rundan um húsini og privatar ognir.

Steinbjørn sigur, at tað verður kommunan, sum fer at samskipa hesar dagar og syrgja fyri, at virkir og einstaklingar sleppa av við órudd og burturkast.

– Í nógvum kommunum og bygdum kring landið liggur nógv og sløðist, og tað er ikki altíð, at fólk hugsa um, hvussu út sær. Klaksvíkin er einki undantak í so máta.

Steinbjørn O. Jacobsen sigur, at hann kundi hugsað sær, at øll kommunan – og hvør einstakur borgari í kommununi – tekur eina hond í, nú Klaksvíkar kommuna fer at skipa fyri ruddingardøgum.

– Nógv av okkum hugsa kanska ikki so nógv um, hvussu út sær rundan um okkum, tí vit eru í hesum umhvørvi hvønn dag. Men gesturin sær tað, sum vit ikki síggja. Nú Norðoyatunnilin letur upp, vilja vit, at býurin er "reinur og fríður", sum borgarstjórin tekur til.

# Løgreglan hundavenjing í Klaksvík

HUNDAVENJING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru tey, sum hildu, at eitt hvørt var á vási í Klaksvík í morgun, tá ið løgreglumenn úr Havnini stevndu norður til Klaksvíkar við hundum.

Men á løgreglustøðini í Klaksvík verður sagt, at soleiðis er ikki.

– Løgreglumenninir eru bert komnir norður higar at venja sínar hundar.

Sagt verður, at skipað verður javnan fyri hundavenjingum, og tað er ikki altíð, at hesar venjingar eru í høvuðsstaðnum, hóast allir hundarnir, sum løgreglumenn hava, eru í Havn.

– Tað kann jú vera gott fyri hundarnar, at teir eisini sleppa at anda luft í seg aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum.

Á løgreglustøðini í Klaksvík siga tey, at einir 5-6 hundar komu norður um Leirvíksfjørð í morgun, og til hvønn hundin er ein løgreglumaður.

– Venjingarnar fevna um nakrar dagar, og hundarnir verða vandir til tað, sum teir vanliga verða brúkti til. Tá ið venjingarnar eru lidnar, fara løgreglumenn og hundar suður aftur um fjørðin.

**Løgreglumenn eiga hundarnar**

Tað er ikki soleiðis, at løgreglan eigur hundarnar, men løgreglumenninir sjálvir.

– At løgreglumenn hava hundar, er soleiðis eisini at egnum áhuga. Teir hava sínar hundar heima við hús, har teir fáa neyðugu røktina, og tá ið teir so eru til arbeiðis, hava teir hundarnar við sær.

– Á løgreglustøðini í Klaksvík siga tey, at við í venjingini eru eisini hundar, sum eru góðkendir til at tevja hasj og onnur rúsandi evni.

– Neyðugt er, at førleikin hjá hundunum verður hildin við líka, og tí verður regluliga skipað fyri slíkum venjingum, siga tey.

Tað hevur annars verið friðarligt í Klaksvík um vikuskifti, men onkur innbrot og herverk hava verið, veit løgreglan í Klaksvík at siga.



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo



*Skip er komið úr Noregi við 3.500 tonsum av skervi, sum nú verða koyrd út í Norðoyatunnilin. Alt tilfarið verður lagt út í vegøkslina í tunlinum*

*Mynd: Anna V. Ellingsgaard*

**Eitt skip er komið á Klaksvíkina úr Noregi við 3.500 tonsum av skervi, sum skal leggjast í vegøkslina í Norðoyatunlinum**

KLAKSVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rúgvan av kervi er stór, har hon liggur á økinum í Klaksvíkini, sum eitt nú er planerað til handilsmiðstøð í býnum.

Heri Hammer, býarverkfrøðingur í Klaksvík, sigur, at skervurin skal leggjast út í vegøkslina í Norðoyatunlinum.

– Eg havi skilt, at talan er um tilsamans 3.500 tons av skervi, sum tilsamans fylla eini 2.000 rúmmetrar.

Býarverkfrøðingurin veit at siga, at skervurin verður lagdur út í vegøkslina gjøgnum allan Norðoyatunnilin.

Vit spurdu eisini Hera Hammer, sum situr í nevndini fyri Norðoyatunnilin, um tíðin fyri upplatingini av tunlinum fer at halda.

– Jú, tað havi eg skilt, at hon fer.

Soleiðis er líkt til, at alt gongur eftir ætlan, og at koyrandi verður undir Leirvíksfirði leygardagin, 29. apríl.